## Havnar Róðrarfelag nýggjan formann

Flaggdagin hevði Havnar Róðrarfelag ársaðalfund, og har takkaði Heðin Hansen fyri seg sum formaður í felagnum. Hann kom upp í nevndina í 1995 og hevur verið formaður síðani 2000. Nýggjur limur í nevndini er Svein Hansen, og hinir eru Rúni Persson, Magni Nielsen, Paul Kragesteen og Magni Brøðraberg. Heimasíðan hjá Havnar Róðrarfelag skrivar, at nevndin fer at skipa seg í næstum.



## Andrew og teir vilja longur upp

Fremad Amager spælir í kvøld útsettan dyst ímóti Ølstykke, og málið hjá teimum í Fremad Amager er púra greitt. Liðið skal vinna dystin og harvið toga seg eitt vet longur upp eftir stigatalvuni. Liðið hjá Andrew av Fløtum er dragnað eitt sindur í stríðnum um uppflyting til superliguna, men enn ber til at koma í nánd av uppflytingini. So skulu fleiri sigrar til, og tann fyrsti má koma í dystinum í kvøld.

# Fróði fekk leikbann í tveir dystir

**B36 má vera Fróða Benjaminsen fyri móti HB og EB/ Streymi**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Landsliðsspælarin Fróði Benjaminsen varð rikin av vølli, tá B36 leygardagin spældi móti fyrrverandi liðfeløgunum hjá Fróða úr B68.

Eftir ein tilburð, har dómari metti Fróða hava sligið Ova Magnussen, fekk miðvallarin reyða kortið. Og ikki óvæntað hevur Kappingarnevndin sektað hetta við leikbanni í tveir dagar.

Tað merkir, at B36 má vera miðvallaran fyri uttan teir báðar komandi dystirnar, sum báðir mugu metast rættiliga týdningarmiklir. Fyrst grannauppgerðin móti HB í kvøld og síðani á heimavølli móti EB/Streymi, sum í løtuni er nummar tvey á stigatalvuni.



*Fróði Benjaminsen má sita uttanfyri í næstu tveimum dystunum hjá B36*

# HB má hanga í B36

**HB hevur ikki ráð at tapa lokalbrakið ímóti B36 í kvøld, men tað verður eingin Panic-loysn á liðnum hjá HB til dystin. B36 má spæla uttan leikbannaða motorin á miðvøllinum**

HB-B36
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Í kvøld verður fyrsta veruliga fótbóltsbrakið í høvuðsstaðnum. Oddaliðið B36 spælir ímóti HB, sum liggur mitt á stigatalvuni eftir fyrstu fimm dystirnar í Formuladeildini, og vinnur B36 dystin, kann felagið leggja sjógv ímillum seg og HB.

Í løtuni hevur B36 13 stig, og HB hevur 7, og endar dysturin í kvøld við sigri til B36, verða tað 9 stig á muni millum feløgini.

Hetta kann HB illa tola, og tí má reyð-svarta havnarfelagið fáa stig burturúr dystinum.

### Eingin Panic

HB hevur alt sítt fólk tøkt til dystin. Kári Nielsen fór út við heilaskjálvta í dystinum sunnudagin, og hann gisti á sjúkrahúsinum. Hann er tó klárur til dystin í kvøld.

Tað er nýggi serbiski miðvallarin hjá HB, Panic, ikki. Loyvini vóru ikki klár, tá ið vit tosa við HB-leiðsluna fyrrapartin í dag, og roknað var ikki við, at hann kann spæla í kvøld. Hinvegin er sannlíkt, at Panic kann spæla við í næsta dystinum hjá HB.

B36 manglar Fróða Benjaminsen til dystin í kvøld. Hann var útvístur ímóti B68 og hevur fingið leikbann í tveir dystir. Tað gevur ivaleyst pláss til Inga Højsted, sum nú spælir aftur fyri B36. Hann er góður avloysari á miðvøllinum.

## VB/S koyrir litava avstað

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

VB/Sumba ætlar ikki at lata seg noyða við vánaligu úrslitini í Formuladeildini higartil í ár. Felagið úr Suðuroy hevur tapt allar sínar fimm dystir, og sunnudagin er botndystur á skránni ímóti ÍF, sum heldur einki stig hevur fingið.

Í gjárkvøldið varð sáttmálin við litaviska verjuspælaran Dalius Staleliunas sagdur upp. Heimasíðan hjá VB/Sumba skrivar, at talan var um ein royndarsáttmála, og VB/ Sumba hevði ikki hug at leingja hendan sáttmála, nú royndartíðin er farin.

Hinvegin hevur VB/ Sumba fingið ein nýggjan spælara úr Danmark. Tað er Christian Soelberg, sum kom til landið í morgun. Hann er verjukendur miðvallarspælari og hevur leikt á 2. deildarliðnum hjá Glostrup. Avtalað er, at fyrsta tíðin er royndartíð hjá báðum pørtum. Gongst sum ætla, kann Sol vera við á formulaliðnum, sum sunnudagin skal leika botndyst í Fuglafirði.




GITIÐ LEIKARAN



**Kappingarreglur**

Frá mánadegnum 3. apríl og í 15 fylgjandi Sosialum verður andliti á einum kendum føroyskum fótbóltsspælara at síggja. Myndin er tó viðgjørd nakað, soleiðis at tað verður truplari at vita, hvør spælarin er.

Á síðu 31 í fótbóltsblaðnum, sum var partur av VikuskiftisSosialinum, eru 15 tómar reglur. Á hesar skulu nøvnini á teimum 15 spælarunum setast.

Tá hetta er gjørt, skal blaðsíðan við nøvnunum sendast okkum. Seinasta freist fyri innlatan er mánadagin 1. mai. Navnið á vinnaranum verður kunngjørt í Sosialinum tann 4. mai.

Minnist til at skriva navn, bústað og telefonnummar á seðilin, sum verður sendir okkum.

Verður avrit av síðuni sent okkum, verður hetta ikki roknað sum gyldugt luttøkuprógv.

Vinnið fótbóltsupplivingina Skotland - Føroyar

ATLANTIC AIRWAYS